# 30 ára starvsdagur á Advokatskrivstovuni

Leygardagin 1. novembur 2008 hevur Birita Thorleifsson 30 ára starvsdag á Advokatskrivstovuni á Frúutrøð.

Birita vaks upp úti við Grønlandsvegin í Havn. Eftir lokna skúlagongd fór hon í skrivstovulæru á Advokatskrivstovuni, ið tá húsaðist í Niels Wintersgøtu. Síðani hevur hon tikið útbúgving sum advokatskrivari.

Seinastu nógvu árini hevur hon tikið sær av bókhaldinum á Advokatskrivstovuni.

Birita er elst av trimum døtrum hjá Ragnu og Martin Thomsen.

Birita er gift Kristiani Thorleifsson. Tey búgva í Purkugerði í Havn og eiga børnini Dann (24 ár) og Ragnheiður (14 ár).



# Ælabogin 10 ár

29. sept. í ár eru 10 ár síðani Ælabogin sá dagsins ljós. Ælabogin er orkestur mannað við 23 tónleikarum við menningartarni. Hetta ítrivið hevur verið, og er, til mikla gleði fyri okkum tónleikarar og okkara nærumhvørvi. Orkestrið hevur framført tónleik og sett serstakan dám á manga veitslu og tiltøk gjøgnum árini. Ælabogin hevur eisini luttikið á hornorkesturstevnum kring landið. Seinast var á Tvøroyri í mai mánað í ár.

Tað var Sámal Bláhamar, sum setti startskotið til Ælabogan. Á ferð í Noregi í 90'unum sá hann Lillehammer korpsið framføra tónleik. Hetta er eitt orkestur, við tónleikarum við menningartarni. Hann var so hugtikin av framførsluni, at hann setti seg í samband við røttu persónarnar, fyri at fáa eitt líknandi orkestur á beinini í Føroyum. Væl gekk, tí stutt eftir vóru góðar kreftir í gongd við fyrireikinum her. Við avbera góðum stuðli frá Napoleon Nolsøe, sum tá var kvøldskúlaleiðari, fóru Brandur Øssursson og Annika Højgaard til verka við fyrireikingunum. Árið eftir fekk Ælabogin eina rúgvu av ljóðførum frá júst sama orkestrinum, sum Sámal Bláhamar hevði upplivað í Noregi. Og síðani tá hevur Ælabogin stórtrivist, til gagns fyri alt Føroya land.



Orkesturleiðarar seinnu árini hava verið Annika Højgaard, Eirikur Skála og Katrin Jørgensen. Fyri megnar avrik menningartarnaðum at frama, fekk Annika herfyri handað ÁRSINS HERÐAKLAPP frá Javna.

Tónlistarliga hevur Ælabogin ment seg væl síðan byrjan. Við serligum pedagogiskum snildum, hava orkesturleiðararnir víst, at tað er møguligt hjá ØLLUM at spæla tónleik. Seinnu árini hava tey nýtt serlig litkort, sum symbol fyri ávísar tónar. Hetta hevur verið til stórt gagn hjá teimum tónleikarum, sum ikki kunna lesa nótar.

Til at hátíðarhalda, at tað nú eru liðin 10 ár, skipar Ælabogin fyri stórfingnari konsert í Müllers Pakkhúsi sunnudagin 2. november kl. 16, har umframt serstaka tónleikaupplivingeisini verða røður og okkurt til góman. Kostnaður kr. 50.

Tað hevði glett okkum, um tit vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum.

**Dagurin**

**31. oktober. Upphav trúbótar Luthers**. Eftir trúbótina koma, sum vera man, eingi nýggj halgimenni upp í álmanakkarnar, men luthersku álmanakkarnir varðveita tey gomlu nøvnini og taka eisini við tey nýggju katólsku nøvnini. So verða eisini ymiskar søguligar hendingar nevndar. Til dømis verður 31. oktober eisini hildin til minnis um at Martin Luther setti 95 setningar upp á slotskirkjudyrnar í Wittenberg.

**1. november. Alla halganna dagur.** Longu í aðru øld var siður at halda minningardagur hjá hvørjum einstøkum blóðvitni á deyðadegnum, men umleið ár 350 varð samtykt at halda minningardag fyri øll ein dag í árinum, og var hann fyrsta sunnudag eftir hvítusunnu.

**2. oktober. Alla sálna dagur.** Umleið ár 1000 kemur í tann siður at halda minningardag fyri øll, sum farin vóru, og als ikki bara fyri halgimennini.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Erling Joensen, í Grótinum, Klaksvík**, andaðist mikukvøldið á Klaksvíkar sjúkrahúsi, 58 ára gamal.

**Anna Kristina Dam Schultz**, ættað úr Vestmanna, búsitandi í Albertslund, andaðist mikudagin 22. oktober, 73 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Glostrup kirke leygardagin 1. november klokkan 12.30.

# Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Jóhannes Øregaard**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Siloa. Tøkk til øll tykkum mongum, sum fylgdu honum til gravar. Ein serstøk tøkk til heimahjálparar og heimasjúkrasystrar, sum vóru um hann tey seinastu árini. Eisini takka vit starvsfólkunum á Eysturoyar Ellis- og røktarheimi og á Giljargarði.

*Vinarlig heilsan*

**Karolina, Maria, Rikka og Elisabeth v/fam.**

# Tøkk



Eg takki hjartaliga øllum tykkum, sum komu at heilsa upp á meg á 90 ára føðingardegnum 24. juli. Eisini takki eg fyrireikarunum og tykkum, sum ringdu.

**Bestu heilsanir**
**Tórir Thomsen, Norðragøta**

Lesið Sosialin -so eru tit við!